HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 01. februar 2024 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila í Hentze, Leivur Simonsen, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen,

Avboð: Gunvør Balle, Kristianna W. Poulsen

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Malan á Dul Nielsen

Skrá:

1) Seinasta fundarfrásøgn – er góðkend

2) **Leiðslan kunnar**

Innskrivingin til 1. flokk:

Talið á innskrivingini er høg, og tað eru vit glað fyri, men vit fáa ikki tikið fleiri enn 48 næmingar í komandi 1. flokk.

Vit hava einki hoyrt aftur um ný/umbygging, hóast staðfest er, at Hoyvíkar skúli má um/nýbyggjast skjótt, og tá skal havast í huga, at næmingatalið, eftir ætlan, skal lækkast frá 2025.

Um skúlin skal nýbyggjast, er spurningurin, hvar mann so skal vera ímeðan? Lættast er allarhelst at byggja ein nýggjan eina aðra staðni.

Telefonreglur

Hvat skal næmingurin hava í huga – og gera?

Hvat skal lærarin hava í huga – og gera?

Hvat skulu foreldur hugsa um?

Vit minna regluliga á reglurnar fyri at stramma uppaftur. Hetta er ein telefonfríur skúli. Lærarin skal samla telefonirnar inn um morgunin, men hetta kiksar av og á av ymsum orsøkum. Umráðandi, at skúlin heldur fast í hesum leistinum. Minna foreldrini á hesa regluna við skúlabyrjan. Tað riggar best at fjerna tær um morgunin og læsa tær inni restina av degnum.

Skúlabyrjan:

Vit kundu hugsað okkum at gjørt eitt skriv um, hvussu vit gera, tá eitt nýtt barn skal byrja í Hoyvíkar skúla. Her er serliga talan um, tá ið talan er um næming, sum kemur mitt í skúlaárinum. Skrivið er hálvliðugt, og skúlastýrið sær skrivið og skal góðkenna, áðrenn vit leggja tað út. Tað er eisini smart at gera mannagongdir fyri foreldraumboðini, so tey kunnu geva foreldrunum hjá nýggjum næmingum kunning um føðingardagar/spælibólkar osv.

3. Onnur mál:

Trivnaðarreglurnar – øll hava fingið tær sendandi, áðrenn fundin

Burdu havt trivnaðarreglurnar sjónligar á heimasíðuni og meiri útførlig punkt.

4. Sjúkrafrávera, starvsfólk

Hví hava starvsfólk á staðnum fráveru?

Fyri at minka um fráveruna hjá næmingum og starvsfólki eru vt farin útførliga at føra fráveru í kervi fyri allar næmingar og starvsfólk.

Vit royna eisini at leggja dent á, at næmingar og starvsfólk helst ikki skulu keypa sær frí.

Tiltak í vár saman við skúlaum við Løgmannabreyt allarhelst 10. apríl

Fundurin lokin kl. 18:07